## Stór skinnframleiðsla í Dímun

Í tvey ár hava tey garvað skinn úti í Dímun og sambært Vágaportalinum, sum hevur prátað við bóndan, so gongst væl at sleppa av við garvaðu skinnini. Tað er Sirri sum selur og í ár hava tey garvað 500 skinn, sum øll eru farin av oynni. Higartil eru tey mest seld í Føroyum, men royndir verða eisini gjørdar at útflyta garvað skinn. Nú er so ætlanin at fáa betri umstøður, tí maskinurnar sum brúktar verða eru stórar og fylla nógv. Í hesum sambandi er longu planerað fyri einum 200 fermetra stórum bygningi, sum verður fletti- og vinnuhús.



## Svimjihøllin væl vitjað

Svimjihøllin í Klaksvík hevur havt munandi fleiri gestir síðani nýggja økan lat upp. Í gjár var stúgvandi fult av fólki úr øllum landinum. Tað var sum at vera til ein samtfiskatúr við Ólavi Halga í svimjihøllini í Klaksvík í gjár, sigur Dávur Winther, mentanarleiðari hjá Klaksvíkar Kommunu. Tað merktist í svimjihøllini, at onnur mentanartiltøk eru í býnum. Hetta er seinasta vikuskifti at leikurin, Sjóveður, verður sýndur, flogbóltskapping er í nýggju badmintonshøllini, og í fótbóltinum er Klaksvíkskappingin. Dávur Winther sigur, at fólk úr Havn, Runavík, Gøtu, Fuglafirði, Vágunum og heilt av Sandi vóru at hitta í svimjihøllini í gjár.



*Al Gore kemur til Føroya á stóra umhvørvisráðstevnu í apríl. Fyrrverandi amerikanski varaforsetin er millum heimsins bestu talarar, men enn eru ikki nógv atgongumerki seld*

# Al Gore selur ikki sum Clinton

**Atgongumerkjasølan til stóru umhvørvisráðstevnuna við millum øðrum Al Gore byrjaði í dag. Higartil eru ikki so nógv atgongumerki seld, men talan er um eitt øðrvísi tiltak, siga fyrireikarnir**

UMHVØRVIÐ
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Esther Dahl, samskipari í Vinnuhúsinum, sigur at nøkur atgongumerkir vórðu seld fríggjadagin, men áhugin hevur ikki verið tann sami sum til tiltakið við Clinton.

- Men tað høvdu vit heldur ikki væntað. Clinton var ein celebrity vitjan, sum hevði breiðan áhuga. Hetta er ein ráðstevna um eitt fakligt evni, og tí kunnu tiltøkini ikki samanberast.

Spurd um prísurin ikki er ov høgur, sigur Esther Dahl, at samanborið við onnur líknandi tiltøk er prísurin ikki serliga høgur.

- Ráðstevnan er yvir tveir dagar, og tí er hetta ikki dýrt. Og vit hava heldur ikki fingið nakra viðmerking um tað, sigur hon.

### Tungir dreingir

Stóra navnið á ráðstevnuni er uttan iva fyrrverandi amerikanski varaforsetin og forsetavalevni, Al Gore. Nýkosni móttakarin av friðarheiðurslønini fer at greiða frá avbjóðingum av veðurlagsbroytingunum, og føroyski havfrøðingurin Bogi Hansen fer at siga frá kanningunum av havstreyminum við Føroyar, sum hevur ávirkan á høvini kring allan heim.

Harumframt verður íslendski vinnulívsmaðurin Orri Vigfússon eisini við. Orri Vigfússon gjørdist kendur, tá hann keypti upp laksakvotur í Føroyum og londunum kring Norðuratlandshavið fyri at steðga fiskimonnum í at oyða laksastovnin. Í dag eru áirnar í Íslandi á tremur við laksi og Vigfússon hevur slóða fyri einum nýggjum burðardyggum vinnutátti í Íslandi.

# Fuglafjørður missir ávirkan

**Fuglafjarðar Kommuna óttast at missa ávirkan í nýggjum stórum kommunufelag. Býráðið hevur samtykt at heita á Kommunusamskipanina um at býta ein stýrislim við Eysturkommuni**

KOMMUNUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*



*Av tí at nýggja Eysturkommunan er største kommuna í eystur Eysturoy, fær Fuglafjørður ikki fastan stýrislim í nýggja kommunufelagnum*

Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag samráðast um at leggja saman í nýtt kommunufelag, og Fuglafjarðar Kommuna hevur viðgjørt upprit um hesa samanlegging, sum skal koma í gildi 1. Juni.

Upprunaliga var ætlanin, at nýggja felagið skuldi hava níggju stýrislimir, men hetta tók Kommunusamskipanin ikki undir við og hevur skotið upp heldur at hava 11 stýrislimir, so at smærri kommunurnar eisini eru umboðaðar.

Fuglafjarðar Kommuna samtykti á býráðsfundi hósdagin at taka undir við uppritinum, men tó við einari viðmerking til býti av stýrislimum.

Sagt verður, at Fuglafjarðar kommuna í 1999 tók undir við, at landið varð býtt upp í níggju økir, tí eftir ætlan skuldi Fuglafjørður sum størsta kommuna í eystur Eysturoy hava ein fastan stýrislim í felagsskapinum.

Men í dag er nýggja Eysturkommunan størsta kommunan í økinum, og tí fær Fuglafjørður ikki longur ein fastan stýrislim.

Kommunan ynskir tí at fáa eina skrivliga samstarvsavtalu um, at Eysturkommunan í hvørjari kommunusetu fær stýrislimin í tvey ár og Fuglafjarðar kommuna í tvey ár.

# Háfoss órógvar ikki bisp

**Jógvan Fríðriksson, bispur heldur tað ikki vera nakran trupulleika, at landsstýriskvinnan í kirkjumálum ikki er limur í fólkakirkjuni. Hetta segði hann í samrøðu við Rás2 í samband við rumblið í Tjóðveldi um hetta mál**

FÓLKAKIRKJAN
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Hóast tað liggur eitt signalvirði í, hvør situr sum landsstýrisfólk, so metir Jógvan Fríðriksson, bispur, ikki tað skal vera krav, at landsstýriskvinnan eigur at vera limur í fólkakirkjuni.

- Vit skulu gera okkara arbeiðið professionelt, og fyri okkum sum kirkjufyrisiting, hevur tað nógv størri týdning, hvønn vælvilja Løgtingið hevur, sigur hann.

Eftir at Dimma í seinastu viku kundi avdúka, at Kristina Háfoss ikki er limur í fólkakirkjuni, er spurningurin hvørs landsstýrisfólki í mentamálum skal vera limur í fólkakirkjuni aftur stungið seg upp.

Undir farnu samgongu, tá Jógvan á Lakjuni sat sum landsstýrismaður, løgdu Heidi Petersen og Torbjørn Jacobsen úr Tjóðveldi uppskot fram um, at landsstýrisfólkið í kirkjumálum skuldi vera limur í fólkakirkjuni. Men Høgni Hoydal sigur í dag, at uppskotið kom frá einstøkum persónum, ikki flokkinum.

### Løgtingið størri týdning

Jógvan Fíriksson, bispur, vísur á, at undanfarni landsstýrismaður, sum ikki er limur í fólkakirkjuni, gjørdi eitt gott arbeiði og megnaði tað, sum í øllum førum